# Burðardyggleiki er vorðið

**FISKIVINNUTING - Tá nakrir havnarmenn í 1785 reiddu skipið Haabet út, og ein dagin fingu 216 fiskar í ein tíma, hildu menn, at royndin mátti steðgast, tí hetta fór at oyða havið. Royndin varð saboterað, og Haabet fór ikki útaftur. Hetta hevði verið ein gyltur møguleiki at komið burturúr oyðuni, sum føroyingar vóru í, men alt fór fyri bakka, segði Viberg Sørensen, formaður í Føroya Reiðarafelag, í áhugaverdum fyrilestri á Fiskivinnutinginum í Norðurlandahúsinum**

Vilmund Jacobsen

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Viberg Sørensen, var ein av fleiri, sum hildu fyrilestur á fiskivinnutinginum í Norðurlandahúsinum.

Í byrjanini av síni røðu helt hann fyri, at orðið burðardygt líkasum er vorðið eitt gandaorð.

- Og hetta er eisini yvirskriftin her í dag, legði hann aftrat.

Hann vísti á, at føroyingar í sínari tíð høvdu lítlan og ongan áhuga í fiskivinnu í mun til tann áhuga, sum var millum okkara grannar.

- Men hin 22. mai í 1772 kom Færø, fyrsta fiskiskipið, sum var bygt til havfiskiskap, á Havnina. Tað var kendi Ryberg, sum hevði stóran handil í Vágsbotni, ið hevði latið skipið byggja. Hann átti fleiri skip, sum vóru til fiskiskap undir Íslandi og hevði nú eisini ætlanir um at fáa føroyingar at byrja havfiskiskap. Langtíðarætlanin hjá honum var at fáa eini 10 skip aftrat til fiskiskap við Føroyar.

Viberg Sørensen segði, at føroyingar tá als ongan áhuga høvdu í hesum og stríddust hart ímóti royndunum.

- Nøkur ár seinni varð hin næsta royndin gjørd. Hetta var í 1785. Tá reiddu nakrir havnamenn skipið Haabet út til fiskiskap. Illa gekst at fáa fólk, og teir máttu fáa fýra soldátar av skansanum at hjálpa til. Teir varpaðu upp á streymasjógvi, snørini stóðu sjálvandi beint aftureftir sjónum, men eftir roynd í ein tíma fingu teir 216 fiskar. Hetta var óhoyrt góður fiskiskapur, og føroyingar hildu, at sjálvandi skuldi hendan royndin steðgast, tí hetta fór at oyða havið.

Viberg vísti á, at sjálvur kommandanturin á Skansanum, sum kallaðist Born, skrivar, at "denne tanke at de fanger får meget og skulle fiske havet tomt og blandet med misundelse hvoraf det menneskelige hjerte sjældent er frit for..."

- Nú á døgum høvdu vit bara sagt, at tað var ikki burðardygt. Hann legði aftrat, at hendan royndin var sostatt saboterað, og

Haabet fór ikki útaftur. Hetta hevði verið ein gyltur møguleiki at komið burturúr oyðuni, sum føroyingar vóru í, men alt fór fyri bakka.

Viberg vísir í sínum fyrilestri á, at Rybergshandil keypti fisk frá útróðrabátum og framleiddi klippfisk, sum var seldur til Spaniu. Avreiðingarmøguleikin var har, men spell var tað, vit ikki dugdu at síggja somu møguleikar, sum útlendingar sóu í okkara fiskigrunnum.

- Bretsk, fronsk, belgisk og skotsk skip høvdu tá fiskað í nógv ár undir Føroyum. Nólsoyar Páll var 19 ára gamal, tá hendan royndin hjá havnamonnunum kollsigldi á aftrurhaldinum og øvinsjúkuni, sum altíð hevur tryvist væl her hjá okkum og hevur køvt mangan framburð.

Og formaðurin í reiðarafelagnum helt fyri, at tað er ikki heilt frítt enn við øvundsjúku her á landi.

- At nakrir fáa meir av køkuni enn eg sjálvur, er líka so stórur spillivandi nú vit skriva 2011, legði hann aftrat.

Hann setti eisini spurningin, hvussu út hevði sæð í Føroyum í dag, um føroyingar í 1772 høvdu stuðlað Ryberg.

## Hvat er burðardygt?

- Orðið burðardygt er ikki so gamalt í okkara máli, men fyri tað hava vit hugsað burðardygt og hava lagt okkum eftir at taka okkum væl av tí, vit hava livað av, bæði í bø, haga og bakka. Ivist tó í, um vit hava hugsa so nógv um fiskastovnin. Vit væntaðu bara, at stovnurin hvíldi í sær sjálvum við góðum og ringum fiskiárum.

Viberg segði, at tá vit umrøða burðardygga fiskiveiði í Føroyum, meina flestu, at bara toskastovnurin er væl fyri - so er burðardyggdin í lagi.

- Men so einfalt er tað ikki. Hetta er eitt víðfevnandi evnið, sum fevnir nógv breiðari, og nógvir spurningar eru ikki svaraðir enn.

Hann vísir á, at tað er FAO-stovnurin undir ST, sum hevur definerað, hvat burðardygg fiskiveiða er. Har eru fimm høvuðsmál, sum skulu uppfyllast fyri, at veiðan kann kallast burðardygg.

FAO sigur at vit skulu reka fiskivinnuna:

* Lívfrøðiliga, ikki fiska meiri, enn stovnurin tolir.
* Tekniskt ,brúka reiðskap sum ikki oyðir.
* Fíggjarliga, tað skal loysa seg at fiska.
* Sosialt, soleiðis at so nógv sum gjørligt fáa ágóðan.
* Umhvørvisvinarligt, vit skulu fara væl um náttúruna.

- Hyggja vit at hesum, sæst, at hjá okkum stendur ikki so illa til. Vit uppfylla flestu av krøvunum. Nøkur kunnu vit kjakast um, men hetta er leisturin, sum vit eiga at halda okkum til, skulu vit uppfylla altjóða krøvini.

Viberg vísti tó á aftur, at vit altíð eru mest upptikin av toski, hýsu og upsa, hóast tað eru fleiri stovnar enn so undir Føroyum, og at nakrir av hesum hava stóran búskaparligan týdning, samstundis sum vit ongar trupulleikar hava við flestu av hesum fiskastovnum.

## Hini fiskasløgini

Størsti stovnurin er upsin, sum vit veiða burðardygt.

- Veiðan hevur seinastu 10 árini ligið um 50.000-60.000 tons. Síðani vit settu fiskidagaskipanina í verk, hevur fiskiskapurin verið sera støðugur og javnt góður, legði hann aftrat.

Viberg Sørensen vísti á, at nú verður at kalla eingin kongafiskur veiddur og veiðan, sum var eini 15.000 tons fyri 10 árum síðan, er nú komin niður 1.600 tons.

- Men tað eru tekin til, at framgongd er aftur í stovninum.

Hann segði, at blálongufiskiskapurin hevur verið vánaligur í longri tíð, men ICES letur væl at hesum stovni, sum er í menning.

- Royndin eftir hesum báðum fiskasløgum er minkað nógv, og sum frálíður missa vit kunnleikan, og



*Í sínum fyrilestri vísti Viberg Sørensen á áhugaverda søgu - og hann vísti eisini á nógvar møguleikar og góð hugskot, sum liggja í føroyskari fiskiveiði*
Mynd: Vilmund Jacobsen

fiskiskapurin fjarðar burtur, hóast stovnarnir tola roynd. Hetta er spell, tí hesi fiskasløgini kundu verið gott íkast til búskapin hjá okkum, legði hann aftrat.

Viberg Sørensen vísti eisini á, at aðrir stovnar eru væl fyri – ja, so væl, at MSC vísir til okkara fiskiskap sum burðardyggan.

- Tað hevur eisini víst seg, at nú norðmenn ikki eru her, gera vit meira av at royna á djúpa vatninum við Føroyar, og soleiðis fáa vit fleiri aktørar, sum aftur gevur meira av sær til samfelagið.

## Makrelur og gulllaksur

Hann segði, at tað eru tveir fiskastovnar, sum vit ikki hava gjørt nógv við her hjá okkum.

- Annar er gulllaksurin, sum nú er blivin eitt gott íkast hjá nøkrum partrolarum um summarið. Tað viðførir eisini, at minni roynd er inni á grunnunum eftir botnfiski, og havið spara vit grunnarnar. Gulllaksurin er ein fiskur, sum vit ikki hava givið nóg stóran ans, men sum helst altíð hevur verið her, og nú vit hava skip og tøkni til hesa veiði, ber væl til. Fíggjarliga er hetta eisini eitt gott íkast.

Viberg segði, at ein annar stovnur er makrelurin, sum ikki nógv roynd hevur verið eftir.

- Vit hava mest brúkt makrel sum býtisfisk við russar, og sjálvir hava vit havt atgongd til makrelveiði í norskum sjógvi og ES-sjógvi. Nógv av makreli hevur verið í okkara sjógvi, og í fjør gjørdust Føroyar ikki samdar við Noreg og ES um, hvat vit halda er okkara partur av heildarkvotuni.

Hann vísti á, at tá semja ikki fekst við hini strandalongdini, var einki at gera uttan at fara at fiska sjálvir.

- Hetta gekk væl, og nú síggja vit, at búskaparráðið tosar um virðir omanfyri miljardina. Hetta er komið sera væl við, serliga nú svartkjafturin bleiv burtur, legði hann aftrat.

Viberg Sørensen segði, at alt virðið á landgrunninum hevur í miðal ligið um eina miljard krónur - ella úr 800 miljónum upp í 1,2 miljardir krónur.

- Tá sigur tað seg sjálvt, at makrelurin vigar tungt fíggjarliga. At hann so eisini vísir seg at vera lættur at fiska, ger hann uppaftur meira áhugaverdan. Tað vísti seg, at skipini, sum í fjør fóru eftir makreli fyrstu ferð, fingu tað væl at bera til. Hetta ger sjálvandi, at menn blíva positivir og veiðihugurin, sum er fundamentið hjá fiskimonnum, hevur góðar dagar.

## Meira burturúr

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag helt fyri, at í upsafiskiskapi høvdu skipini helst fingið meira burturúr við at fryst umborð, og tað høvdu virkini eisini fingið.

- Tá kundu vit lagt alt nógv betur til rættis. Nógv hevur verið tosað um fastar lønir í flakavinnuni. Komu skipini inn við frystari vøru, høvdu allir partar fingið meira burturúr. Tað er bara at hyggja eftir, hvat norðmenn gera. Men tað skal stór umbygging til, áðrenn vit hava frystiskip sum veruliga megna uppgávuna.

Hann segði, at toskurin